

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Dagrøktarar

## Dagrøktarar til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir eftir dagrøktarum at byrja skjótast gjørligt.

**Vit bjóða**

- eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv, har tað heimliga umhvørvið hevur stóran leiklut í gerandisdegnum
- hollan stuðul frá kommunualu skipanini.
- at ein triðingur av lønini verður skattafríur.

**Vit vænta at**

- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.
- hølini har børnini verða ansað eru hóskandi
- møguleikar eru fyri uttandura virksemi

**Setanarviðurskifti**

Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála við Starvsmannafelagið og Kommuna Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meiri fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Marjun Midjord, dagrøktarleiðara tlf. 302010, lokal 1089, teldupost marjun@torshavn.fo ella við at fara inn á heimasíðuna www.torshavn.fo/leysstorv

**Umsókn**

saman við royndum, upplýsingum um útbúgving og møguligum viðmælum skulu sendast Dagrøktarskipanini, Postboks 32, 110 Tórshavn

**Les meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

**www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni**

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Reglur fyri flogfenaðhald í Tórshavnar kommunu

Tann 1. januar 2006 varð nýggj reglugerð um flogfenaðhald í Tórshavnar kommunu sett í gildi. Endamálið við reglugerðini er at tryggja, at flogfenaðhald ikki elvir til ampa fyri grannar og onnur.

Reglugerðin lýsir m.a. krøv, ið verða sett til búr, garðar, girðingar og hús, ið verða nýtt til flogfenað sum høsn, gæs, dunnur, kalkunur, dúgvur og annan fugl.

**Nýtt flogfenaðhald**
Tey, ið hava ætlanir um at fara undir flogfenaðhald, eiga at boða næstu grannum sínum frá, og kunnu spyrja seg fyri hjá kommununi um ivamál.

**Verandi flogfenaðhald**
Flogfenaðhald, ið longu er skipað, áðrenn reglugerðin kom í gildi, kann halda fram sum er, men kann tó koma undir meginreglurnar. Herundir kunnu krøv ella forboð verða sett teimum.

Reglugerðin fevnir ikki um Hvítanes, Norðradal, Syðradal, Velbastað og Kirkubø.

Vinnuligt virksemi er tó undantikið.

www.torshavn.fo

---

www.sosialurin.fo — Leyst starv á Sosialinum




# Marknaðarfólk

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álitandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tlf. 341823. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. februar, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*

---

norden

Nordplus Vaksin

# Stuðul frá Nordplus - Vaksin

**Nordplus vaksin er ætlað at menna samstarvið fyri fólksliga upplýsing og undirvísing av vaksnum.**

Stuðul verður veittur til flytføris- og samstarvsverkætlanir, sum kunnu menna nýggj hugskot, háttaløg (metodur), tilfeingi, partar av skeiðum o.tl. Bæði luttakarar og lærarar kunnu vera við í samstarvinum. Harafturat verður stuðul veittur til at kunna um royndir hjá hvørjum øðrum, til kortlegging og útgreining av ávísum økjum og til at byggja nýggj netverk upp.

- Stuðul kann td. vera veittur til fyrireikingar til verkætlanir at fyrireika vitjan hjá undirvísarum og øðrum við ábyrgd fyri frálæru.
- Stuðul kann vera veittur til uppihald í samband við eftirútbúgving, lestur ella undirvísing hjá lærarum og øðrum. Skifti millum luttakarar í fólkaupplýsing og í undirvísing fyri vaksin

**Umsóknarfreistin til Nordplus Vaksin er 1. mars 2006, og 1. oktober 2006**

Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:
Nordplus Junior - Umsóknarfreistir: 15. mars 2006
Nordplus Granni - Umsóknarfreistir: 1. februar 2006
Nordplus Mál - Umsóknarfreistir: 15. oktober 2006
Nordplus - Umsóknarfreistir: 1. februar 2006

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk/nordplus-voksen/ ella hjá Altjóða Skristovuni í Tórshavn. Tlf. 322065 - t-post: ask@ask.fo - www.ask.fo

Sosialurin 341800